Alitíðindi

www.fiskaaling.fo NR 3 2002 430 HVALVÍK

# Smoltstøðirnar

## Hagtøl fyri smoltstøðirnar í 2001 og fyrru helvt av 2002

*Andrias Reinert*

Samandráttur

***Fleiri m$^3$ at ala smolt og síl í***

Hugaliga gongdin í alivinnuni í 2000 og árini undan setti ferð á arbeiðið at víðka og nútímansgera smoltstøðirnar kring landið. Broyttu viðurskiftini í vinnuni í 2001 og 2002 við munandi prísfalli á alifiski og fleiri aliøkjum, ið liggja við ongum fiski orsakað av sjúku, hava elvt til, at naggatódn kom í nakrar av ætlaðu útbyggingunum. Tøl frá smoltstøðunum í 2001 vísa tó, at rúmdin á kørum og brunnum, sum verða nýtt at ala smolt og smásíl í, er vaksin upp í 22.000 m$^3$ við árslok 2001 og rúmdin av alinótum á SEV brunnunum, sum var minkað niður í 16.500 m$^3$ í 1997, er eisini økt í 2001 og táttar nú í 40.000 m$^3$.

***21 mill. smolt og síl ár 2001***

Alistøðirnar á sjónum fingu 16,9 mill. laksasmolt og 4 mill. ælabogasíl í 2001, ella slakar 21 mill. sjóbúnar fiskar, at meta saman við 19,3 mill í 2000, 15,5 mill. í 1999 og 13,3 mill í 1998. Eftir at hava vitjað á flestu smoltstøðunum í september 2002 verður mett, at samlaða talið av fiski, sum fer á sjógv í 2002 minkar niður aftur á støðið í 2001 ella umleið 19,3 mill. sjóbúnar fiskar.

***Færri heystsmolt og síl í 2002***

Fyrra halvár 2002 eru 10,5 mill. laksasmolt farin á sjógv.Um ársskiftið mettu smoltstøðirnar, at 8,5 mill. smolt fóru at verða latin alistøðunum á sjónum seinna hálvár 2002. Í september var hetta tal tó minkað niður í 6,3 mill. smolt, óivað orsakað av ótryggari útlitum hjá alivinnuni. Talið av sílum, sum fara á sjógv, er somuleiðis minkað úr 4 mill. í 2001 niður í 2,5 mill. í 2002.

## Víðkað framleiðsluføri á smoltstøðunum

*Framleiðslu-føri økt í 2001*

Í Alitíðindum Nr 2 2001 varð nógv gjørt burtur úr at lýsa tær munandi broytingar og útbyggingar, sum eru farnar fram á flestu smoltstøðum kring landið seinnu árini, har eitt nú fleiri ymiskar skipanir eru royndar at reinsa og endurnýta vatnið til fiskin, og har fiskurin nú verður aldur í alt størri eindum. Á Mynd 1 síggja vit, at framleiðsluførið eisini í 2001 er økt bæði á vanligu smoltstøðunum, sum ala fiskin í kørum, og hjá teimum, sum ala smolt og síl í nótum á SEV-brunnum.




*Mynd 1. Rúmd av alikørum á øllum smoltstøðunum tilsamans og av nótunum, sum verða nýttar at ala laksasmolt og síl í á SEV-byrg-ingunum 1995-2001.*

Rúmdin á kørunum á øllum smoltstøðunum tilsamans er í 2001 økt upp í 22.000 $m^3$, og rúmdin á øllum nótunum nærkast 40.000 $m^3$.

*Færri fiskar fyri hvønn $m^3$ í nótum*

Munandi færri fiskar verða tó aldir í nótunum í mun til í tilsvarandi rúmd í kørum. Sum dømi kann nevnast, at í 2001 geva vanligu smolt-støðirnar upp, at tær í miðal hava fingið 803 smolt/síl undan fyri hvønn $m^3$ av karrúmd, meðan smoltstøðirnar á SEV-brunnunum í miðal hava fingið 93 smolt/síl burtur úr hvørjum rúmmetur av alinót.

Í Talvu 1 eru ymisk tøl, sum skotar geva upp fyri smoltaling í 2000, mett saman við tøl frá smoltstøðunum í Føroyum í 2001.
Smoltstøðirnar í Føroyum eru í miðal meira enn tvífalt so stórar sum smoltstøðirnar í Skotlandi, bæði tá tað snýr seg um vanligar støðir, har fiskurin verður aldur í kørum, og støðir, sum ala í nótum á vøtnum og byrgingum. Somuleiðis sæst í talvuni, at alarin í Føroyum fær væl fleiri fiskar úr hvørjum $m^3$ av alirúmd, sum er til taks, enn smoltalarin í Skotlandi.
Sum víst í Talvu 4 á síðu 8 hava føroyingar lagt seg eftir at ala heystsmolt (½ árs smolt- ella S½) í væl størri mun enn skotar, og tað er

óivað ein orsøk til, at fleiri fiskar samanlagt fáast úr hvørjum m$^3$ av alirúmd um árið á smoltstøðunum í Føroyum.

Talva 1. Aling av smolti í Føroyum og Skotlandi.

| | Føroyar 2001 | | Skotland 2000 | |
|---|---|---|---|---|
| | Støðir við kørum | Støðir við nótum | Støðir við kørum | Støðir við nótum |
| Tal av Smoltstøðum íalt | 19 | 4 | 99 | 85 |
| Rúmd at ala í íalt m$^3$ | 21.000 | 39.000 | 45.000 | 344.000 |
| Rúmd pr. smoltstøð m$^3$ | 1.131 | 9.871 | 455 | 4.047 |
| Ald smolt/síl íalt, mill. | 17 | 4 | 22 | 24 |
| Ald smolt/síl pr. m$^3$ | 803 | 93 | 478 | 70 |

Fyri hvørt fólkið, sum arbeiddi á smoltstøðunum í Føroyum vórðu avreidd 133.300 laksasmolt ella smásíl í 2001. Tilsvarandi talið, ið skotar geva upp fyri 2000, var 102.700 smolt fyri hvørt fólkið, meðan hvørt fólkið á smoltstøðunum í Noregi aldi 143.022 smolt/síl í 2000.

## Lívfiskur

***Tríggjar smoltstøðir strúka laks***

Eins og í 2000 struku tríggjar smoltstøðir laks í 2001 og lótu rogn, laksayngul og maðkapirrur til hinar smoltstøðirnar í landinum. Bert ein støð hevur strokið ælabogasíl á vári 2001 og 2002.

*Talva 2. Laksur og síl vald til lívfisk 1997-2001.*

| Ár | Laksur | | | Ælabogasíl | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Rognaf. | Siljaf. | Íalt | Rognaf. | Siljaf. | Íalt |
| 2002 | | | | 1.065 | 104 | 1.169 |
| 2001 | | | | 1.482 | 173 | 1.655 |
| 2000 | 7.613 | 2.916 | 10.529 | 750 | 315 | 1.065 |
| 1999 | 6.665 | 1.505 | 8.170 | 1.050 | 630 | 1.680 |
| 1998 | 3.709 | 770 | 4.479 | 130 | 40 | 170 |
| 1997 | 2.081 | 387 | 2.468 | 150 | 50 | 200 |

Væl er lagt upp fyri við lívfiski seinnu árini.

## Laksasmolt í 2001

***16,9 mill. smolt í 2001 16,8 mill. í 2002***

Íalt lótu smoltstøðirnar 16,9 mill. laksasmolt í 2001 í mun til 15,7 mill. í 2000 og 14,8 mill. í 1999.

Fyrru helvt av 2002 fóru 10,5 mill. laksasmolt á sjógv, og í september mettu smoltalarar, at umleið 6,3 mill. fóru at verða latin alarum annað hálvár, ella íalt 16,8 mill. laksasmolt í 2002 umframt síl. Um ársskiftið 2001-2002 varð ein líknandi meting gjørd, og tá mettu alarar, at 22 mill. laksasmolt fóru at verða at lata alarum á sjónum í 2002.

Her eru tað tey meira ivasomu útlitini, ið hava verið hjá alivinnuni, sum gera, at hildið verður aftur við at koyra fisk á sjógv. Fiskur, sum var ætlaður at fara á sjógv á heysti 2002, verður í fleiri førum gangandi á smoltstøðini, í teirru vón at tað fer at bera til at koppseta fyri ILA á vári 2003.

***Hvussu stór eru smoltini ?***

Vit hava býtt smoltini upp í tríggjar bólkar eftir støðd: upp til 50 g, 50-60 g og smolt omanfyri 60 g, og lutfallið millum hesar bólkar frá 1997 til 2001 er avmyndað á Mynd 2. Ein líðandi vøkstur sæst í lutfallinum av fiski omanfyri 60 g. Nakrar av teimum stóru útbygdu smoltstøðunum leggja seg nú meira eftir at ala væl størri smolt til vinnuna á sjónum.




*Mynd 2. Lutfallið í prosentum millum teir ymisku støddarbólkarnar av smoltum sum eru farin á sjógv frá 1997 til 2001.*

***Nær fara smoltini á sjógv ?***

Villu smoltini leita úr ánni til havs á vári, og hetta upprunaliga mynstur var eisini lagið øll tey fyrstu árini í alivinnuni til 1994, tá alarar av álvara fóru at seta smolt út á heysti bert “summargomul”. Hesin arbeiðsháttur vant so nógv upp á seg, at meira enn 60% av fiskinum, sum fór á sjógv í 1997 og 1998, var heystsmolt (S½).

Í 1999 og 2000 var býtið javnt millum vár- og heystsmolt, í 2001 vóru heystsmoltini 44,5% av samlaða talinum og í 2002 eftir øllum at døma “bert” 37,7%. Nú tøknin hevur tikið náttúruna av ræði, og smolt fara á sjógv alla árstíð, eru heitini “vár- og heystsmolt” heldur misvísandi, men verða tó í Alitíðindum framvegis nýtt um smolt, sum fara á sjógv ávíkavíst fyrra- og seinna hálvár.

Á Mynd 3 er víst hvussu mong smolt eru farin á sjógv hvønn árs-fjórðing sær seinastu 5 árini. Sí eisini Mynd 6 á síðu 7 og Talvu 4 á síðu 8.




*Mynd 3. Laksasmolt latin alarum á sjónum frá 1997 til og við 2001 hvønn ársfjórðing sær.*

## Goymsla pr. 31.12.2001.

***Fleiri rogn***

Smoltstøðirnar, sum ala í nótum á SEV brunnum og onkrar av teimum smærru, sum ala í kørum, keypa yngul/maðkapirrur frá øðrum alarum at ala víðari til smolt. Flestu smoltstøðirnar keypa tó laksarogn, tá tey eru komin í eyga.




*Mynd 4. Rogn verða klækt á 15 smoltstøðum. Stabbarnir vísa broytingar í nøgd av laksarognum mált í litrum, sum eru løgd til klekingar 1996-2001 á hesum smoltstøðum.*

Á Mynd 4 er gjørt upp, hvussu mangar litrar av rognum 15 smoltstøðir hava lagt inn til klekingar hvørt heystið frá 1996, býtt upp soleiðis: 1) færri enn 200 litrar, 2) millum 200 og 300 litrar o.s.fr. Á heysti 2001 løgdu 3 smoltstøðir oman fyri 1000 litrar av laksarognum til klekingar.

***56 mill. laksa- og sílarogn***

Laksarognini, sum smoltstøðirnar løgdu til klekingar á heysti 2001/vári 2002, vórðu, tá tey vóru komin í eyga, gjørd upp til 8.123 litrar í alt. Her rokna vit við, at tað eru 6000 rognkorn í hvørjum litri, og svarar tað til, at 49 mill. eygarogn vórðu nýtt til aling av laksasmolti í Føroyum, umframt 730 litrar ella 7,3 mill. rognkorn undan ælaboga-sílum á vári 2001. Tilsvarandi tøl fyri nøgd av rognum undanfarnu árini eru avmyndað sum stabbar á Mynd 5.

Hesi tøl, um nøgd av rognum hvørt árið, eiga at verða tikin við tí fyrivarni, at nú smoltstøðir í stóran mun eru farnar at køla rogn, er í summum førum lítið komið burtur úr hesum rognum, og dømi er um, at somu rogn eru tald við bæði um heystið og "á goymslu" várið eftir.




*Mynd 5. Nøgdin av laksa- og sílarognum, komin í eyga, sum eru løgd til klekingar á smoltstøðunum kring landið 1996 –2001.*

***1,7 eygarogn til hvørt smoltið***

Telja vit saman í Talvu 3, síggja vit, at fyri árini 1996-2001 komu 83 mill. smolt burtur úr 138,9 mill. eygarognum ella við øðrum orðum, at vit hetta tíðarskeið í miðal hava nýtt 1,7 eygarogn til hvørt smoltið, sum er farið á sjógv.

***Forsøgn fyri smolt- árg. 2002-2003***

Fyrra hálvár 2002 eru 10,5 mill. smolt farin á sjógv, í høvuðsheitum várssmolt (S1) av 2001 yngulárgangi. Smoltalarar mettu í september 2002, at teir umframt fara at sleppa av við 6,3 mill. fiskar av 2002 yngul-árganginum, sum búnast til heystsmolt (S½). Metingin niðanfyri, um hvussu mong laksasmolt fara at verða slept í alinótirnar í 2003, eigur, sum vera man, at verða tikin við størsta fyrivarni.

- Ár 2000 7,8 mill.S1 + 7,9 mill S½ = 15,7 mill. laksasmolt
- Ár 2001 9,4 mill.S1 + 7,5 mill S½ = 16,9 mill. laksasmolt
- Ár 2002 10,5 mill.S1 + *6,3 mill S½ = 16,8 mill. laksasmolt*
- *Ár 2003 12,0 mill.S1 + 6,0 mill S½ = 18,0 mill. laksasmolt*

**Smolt pr. yngulárgang**

*Talva 3. Tal av eygarognum í mun til ald smolt pr. yngulárgang frá 1996 til 2001 býtt á heyst- og vársmolt og leys meting fyri yngulárgangin 2002 - (metingar við skráskrift).*

| Eygarogn heystið fyri Mill. | Yngul-ár-gangur | S½ á sjógv sama ár mill. | S1 á sjógv árið eftir mill. | Smolt íalt pr. yngul-árgang mill. | Eyga-rogn pr. smolt |
|---|---|---|---|---|---|
| 49,7 | 2002 | *6,3* | *12,0* | *18,0* | *2,7* |
| 36,3 | 2001 | 7,5 | 10,5 | 16,8 | 2,0 |
| 26,8 | 2000 | 7,9 | 9,4 | 17,3 | 1,5 |
| 22,6 | 1999 | 7,2 | 7,8 | 15,0 | 1,5 |
| 20,9 | 1998 | 7,8 | 7,6 | 15,4 | 1,4 |
| 17,4 | 1997 | 5,2 | 4,8 | 10,0 | 1,7 |
| 14,9 | 1996 | 3,8 | 3,5 | 7,3 | 2,0 |

Metingin av talinum av vársmoltum í 2003 er eftir ábending frá smoltstøðunum, meðan talið av heystsmoltum bert er endurtøka av talinum frá 2001 og, sum vera man, sera óvist.




*Mynd 6. Talið av smoltum og sjóbúnum sílum, sum smoltstøðirnar hava latið árini frá 1991 til og við vársmoltunum í 2002, og forsagnir fyri heystsmolt og síl seinnu helvt av 2002 og leys meting fyri 2003.*

Sum tað sæst á Mynd 6, er talið av fiski, sum smoltstøðirnar hava latið, støðugt økt síðan fyrst í 90-árunum, og hóast stígur fyribils sær út til at vera komin í, er talið av fiski, sum er latin alistøðunum á sjónum, ferfaldað hesi ár. Hetta sæst aftur í útflutningi av alifiski, sum víst í Talvu 9 síðu 12.

Metingin av, hvussu mong smolt og síl fara á sjógv í 2003, eigur at verða tikin við neyðugum fyrivarni, og talið kann broytast munandi, alt eftir hvussu útlitini verða í alivinnuni, eitt nú við koppseting móti ILA.

***Halda aftur við heystsmoltum***

Alivinnan í Føroyum hevur nýtt heystsmolt í væl størri mun enn vinnan í grannalondunum, sum ala laks. Í Talvu 4 er talið av heystsmoltum í alivinnuni í Føroyum mett saman við heystsmolt í vinnuni í Skotlandi og í Noregi.

*Talva 4. Smolt latin alivinnuni á sjónum í Føroyum, Skotlandi og Noregi (tald í túsund) og hvussu mong prosent eru heystsmolt (S½) av tí, sum fer á sjógv hvørt árið (fyribilstøl og metingar við skráskrift).*

| | Føroyar | | Skotland | | Noreg | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Smolt íalt | % S½ | Smolt íalt | % S½ | Smolt íalt | % S½ |
| 2002 | *16.795* | *37,7* | | | | |
| 2001 | 16.899 | 44,5 | *50,200* | | 135.078 | * |
| 2000 | 15.652 | 50,0 | 45.185 | 21,1 | 130.735 | * |
| 1999 | 14.538 | 51,0 | 41.106 | 28,2 | 122.055 | * |
| 1998 | 12.771 | 60,1 | 45.870 | 27,9 | 114.584 | 27,2 |
| 1997 | 8.646 | 60,2 | 42.766 | 20,9 | 111.900 | 21,2 |
| 1996 | 7.283 | 52,6 | 32.838 | 16,8 | 100.665 | 19,8 |
| 1995 | 7.759 | 46,9 | 26.786 | 9,1 | 98.199 | 22,2 |
| 1994 | 5.530 | 28,8 | 21.953 | 8,5 | 82.908 | 14,2 |

* Síðan 1998 er ikki skilt ímillum vár- og heystsmolt í hagtølunum vit fáa úr Noregi.

## Ælabogasíl

***Áhugi at ala síl***

Frá bert at hava verið viðfáningur í mun til aling av laksi í Føroyum hava alarar lagt seg meira eftir at ala síl seinnu árini. Prísurin hevur verið góður eitt tíðarskeið, og tað sær út til, at fleiri av sjúkunum, sum hava verið til bága fyri laksaalingina, ikki nerva sílini á sama hátt. Á Mynd 6 og í Talvu 5 sæst, hvussu óføra nógv áhugin at seta fleiri ælabogasíl við er vaksin seinastu árini. Orsakað av hesum verður, sum víst í Talvu 9, útflutningur av sílum fleirfaldaður í 2002.

*795 litrar av sílarognum í 2002*

Út við 795 litrar av sílarognum vórðu løgd til klekingar í 2002 í mun til ávikavist 730, 735, 300, 115 og 65 litrar fimm tey undanfarnu árini.

*Sílini úr 4 niður í 2,5 mill. í 2002*

Einans tvær smoltstøðir fingust í mong ár við at seta síl við. Men í 1999 lótu fýra smoltstøðir slaka mill. av ælabogasílum til alistøðir á sjónum. Í 2000 lótu 8 smoltstøðir 3.6 mill. síl og í 2001 fóru stívliga 4 mill ælabogasíl á sjógv. Eftir meting, sum er gjørd í september, verða tó ”bert” 2,5 mill. ælabogasíl latin alistøðunum í 2002, og tað, sum hevur fingið alarar aftur at vera meira varnar við sílum, er sera vánaligur sílaprísur í 2001 og fyrru helvt av 2002. Í Talvu 5 er yvirlit yvir talið av sílum, sum alistøðirnar hava fingið síðan 1996.

*Talva 5. Ælabogasíl latin alistøðum á sjónum árini 1996-2001 og meting fyri 2002 tald í 1.000 ( metingar við skráskrift).*

| Ár | *2002* | 2001 | 2000 | 1999 | 1998 | 1997 | 1996 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Síl | *2.448* | 4.046 | 3.627 | 945 | 513 | 994 | 346 |

Í 2002 hava tvær smoltstøðir keypt sílarogn og ein støð smáar ælabogamaðkapirrur. Nú munandi betur prísur hevur verið at fingið fyri sílini seinnu helvt af 2002, kann áhugi fyri sjóbúnum sílum aftur vaksa.

*Norðmenn økt um ælabogasílini*

Alarar í Noregi hava sum kunnugt økt munandi um sílini. Í 1995 koyrdu teir 10,6 mill ælabogasíl á sjógv, í 2001 24,3 mill. og norðmenn taka væntandi eini 70.000 tons av sílum í 2002. Hinvegin gera skotar sera lítið av at ala síl á sjónum. Bert 3 støðir avreiddu tilsamans 784 tons av ælabogasílum, sum vóru ald á sjónum í 2000, meðan 41 støðir aldu síl í vatni og avreiddu 4.370 tons íalt.

## Ymiskt

Fóður

*1.385 tons av fóðri*

Í Talvu 6 er sett upp hvussu nógv fóður smoltstøðirnar hava givið fiskinum 1997 – 2001. Nøgdin av fóðri er í 2001 meira enn tvífaldað í mun til fóðurnýtsluna í 1997.

*Talva 6. Fóður nýtt á smoltstøðunum 1997 –2000*

| Ár | 2001 | 2000 | 1999 | 1998 | 1997 |
|---|---|---|---|---|---|
| Tons | 1.385 | 1.222 | 871 | 841 | 631 |

Manning

*157 arbeiðspláss*

Talið av fólki, sum hevur arbeitt á smoltstøðunum 1995-2001, er víst í Talvu 7. Talið er gott og væl tvífaldað hesi ár. Arbeiðstíðin er roknað sum “ársarbeiði”, og eisini eykaarbeiði á smoltstøðunum er mett á henda hátt.

*Talva 7. Manning á smoltstøðunum 1995 - 2001.*

| Arbeiði: | Fast | Eyka | Fólk íalt | % fleiri |
|---|---|---|---|---|
| 2001 | 108 | 49 | 157 | 7,0 |
| 2000 | 102 | 45 | 147 | 15,5 |
| 1999 | 88 | 39 | 127 | 10,0 |
| 1998 | 77 | 40 | 117 | 17,9 |
| 1997 | 70 | 29 | 99 | 19,3 |
| 1996 | 59 | 24 | 83 | 10,7 |
| 1995 | 58 | 17 | 75 | |

Sjúka

Lítið verður gjørt burtur úr at seta nakað í teigin í spurnarbløðunum, har spurt verður um hesi viðurskifti. Samanumtikið kann tó sigast:

***IPN***

Seks smoltstøðir siga frá um IPN á støðini í 2001. Alt bendir tó á, at flestu støðirnar í større og minni mun merkja hesa virus-sótt. Ein smoltstøð sigur frá at hava mist 5% av ynglinum orsakað av IPN, meðan ein hevur mist heili 30% av teimum maðkapirrum, sum vórðu meinast raktar av hesum.

***BKD***

Tríggjar støðir siga frá bakteriu-sóttini BKD í 2001, og hetta hevur í nøkur ár verið til stóran ampa fyri alingina á hesum støðum umframt fyri alivinnuna á sjónum. Ein smoltstøð avgjørdi tí at taka allan fiskin av, sum var eftir á støðini, tá vársmoltini vóru farin á sjógv í 2002. Hetta fyri at kunna sóttreinsa alla støðina í góðari tíð, áðrenn fiskur aftur verður settur við komandi vár. At talið av heystsmoltum í 2002 er minkað við 1,2 mill. í mun til talið í 2001, er m.a. orsakað av hesum, sí Talvu 3.

***ILA***

ILA er ikki ávíst á nakrari smoltstøð í Føroyum, men nú alt fleiri alistøðir á sjónum eru noyddar at leggja raksturin til rættis eftir hesi sótt, hevur tað, sum vera man, stóra ávirkan á arbeiðsgongdina á smolt-støðunum.

Vøkstur í alivinnuni um allan heim.

***Mettaður marknaður***

Aling av laksi hevur vundið óført uppá seg í Føroyum, sí Talvu 8, eins og í mongum londum um allan heim, sí Talvu 9. Marknaðurin fyri laks er somuleiðis vaksin óført, men summi ár verður alt meira, enn marknaðurin megnar at taka undan. Í 1991 fór Fiskeoppdretternes Salgslag í Noregi (FOS) av knóranum av hesi orsøk. Hetta elvdi til, at nógvir alarar fóru sama veg og til álvarsligt bakkast fyri alla vinnuna í

Noregi, og sum kunnugt var kreppa somuleiðis í alivinnuni í Føroyum fyrra part av 90-árunum.

Slík óløgi elvd av ov stórum útboði sýnast at raka alivinnuna við ávísum millumbili.

*Talva 8. Útflutningur av alifiski úr Føroyum frá 1987 til 2001 og forsøgn fyri 2002 – tons.*

| | Ælabogasíl | | | Laksur | | | Alifiskur | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Ár | Útflutt vekt | Kruvd vekt | **Rund vekt** | Útflutt vekt | Kruvd vekt | **Rund vekt** | Kruvd vekt | **Rund vekt** |
| 1987 | 1.748 | 1.824 | **2.073** | 3.558 | 3.558 | **3.953** | 5.382 | **6.026** |
| 1988 | 1.845 | 1.969 | **2.237** | 3.443 | 3.443 | **3.825** | 5.411 | **6.062** |
| 1989 | 233 | 256 | **291** | 7.792 | 7.792 | **8.658** | 8.048 | **8.949** |
| 1990 | 46 | 50 | **57** | 10.805 | 10.805 | **12.005** | 10.855 | **12.062** |
| 1991 | 435 | 462 | **525** | 13.893 | 13.965 | **15.517** | 14.427 | **16.042** |
| 1992 | 644 | 671 | **762** | 15.941 | 16.117 | **17.908** | 16.788 | **18.670** |
| 1993 | 987 | 1.018 | **1.157** | 15.318 | 15.701 | **17.445** | 16.719 | **18.602** |
| 1994 | 408 | 475 | **540** | 12.433 | 13.526 | **15.029** | 14.001 | **15.569** |
| 1995 | 64 | 70 | **79** | 6.910 | 7.518 | **8.353** | 7.587 | **8.587** |
| 1996 | 514 | 571 | **649** | 13.856 | 15.070 | **16.744** | 15.641 | **17.393** |
| 1997 | 1.254 | 1.340 | **1.523** | 17.733 | 18.777 | **20.851** | 20.106 | **22.374** |
| 1998 | 842 | 889 | **1.010** | 15.427 | 17.154 | **19.060** | 18.043 | **20.070** |
| 1999 | 1.805 | 1.965 | **2.233** | 30.728 | 33.339 | **37.043** | 35.304 | **39.276** |
| 2000 | 429 | 473 | **537** | 25.877 | 28.292 | **31.436** | 28.765 | **31.973** |
| 2001 | 1.410 | 1.520 | **1.727** | 36.623 | 39.698 | **44.109** | 41.218 | **45.836** |
| *2002* | | *7.035* | ***8.794*** | | *42.492* | ***47.209*** | *49.527* | ***56.003*** |

***Dumping ákæra***

Seinasta óløgi av hesum slag, sum tók seg upp í 2001, hevur umframt álvarsligt prísfall, sum kunnugt eisini elvt til, at alivinnan í Føroyum er ákærd fyri at hava selt laks fyri ”dumpingprís” á EU marknaðinum. Talva 9 vísur vøksturin í laksaaling um allan heim seinastu 10 árini.

***141% vøkstur í Føroyum***

Laksaalingin um allan heim er vaksin við 285% hetta tíðarskeið, í londunum, sum ala laks í Europa, er alingin vaksin samanlagt við 203%. Laksaalingin í Føroyum kann ”bert” vísa á 141% vøkstur, meðan norðmenn hava økt um sína laksaaling við 191%, skotar við 317% og chilenar liggja á odda við 921% vøkstri í aling av atlantshavs laksi.

*Talva 9. Vøkstur í aling av atlantshavs laksi um allan heim 10 ára skeiðið frá 1992 til 2001 – 1000 tons.*

| Øki | 1992 | 2001 | Vøkstur 1000 tons | Vøkstur % |
|---|---|---|---|---|
| Noreg | 141 | 411 | 270 | 191 |
| UK | 36 | 150 | 114 | 317 |
| Írland | 10 | 23 | 13 | 130 |
| **Føroyar** | **17** | **41** | **24** | **141** |
| Ísland | 3 | 2 | -1 | -33 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Europa | 207 | 627 | 420 | 203 |
| Canada | 17 | 97 | 80 | 471 |
| USA | 10 | 24 | 14 | 140 |
| Chile | 24 | 245 | 221 | 921 |
| Australia | 3 | 12 | 9 | 300 |
| Um allan heim | 261 | 1004 | 743 | 285 |

Tølini fyri framleiðslu í 1992 og 2001 eru úr KONTALI ANALYSE nr.9, 2002

***Tøkk til:***

*Alararnar fyri góða undirtøku við spurnarbløðunum og ómak at svara teimum mongu spurningunum.*
*Ingvard Fjallstein fyri viðgerð av hagtølum og gerð av myndum.*
*Manning á P/F Fiskaaling fyri rættlestur og góð ráð.*
*Fiskasjúkutænastuna fyri gjøgnumgongd av brotinum um sjúku.*

-------------

*Tølini um aling av smoltum í Skotlandi eru úr: Scottish Fish Farms Annual Production Survey, 2000. The Scottish Office Agriculture, Environment and Fisheries Department.*
*Norsku tølini eru úr: Statistikk for fiskeoppdrett 2001 – Fiskeridirektoratet - Bergen.*

*Í Talvu 8 er forsøgnin fyri 2002 grundað á tølini, sum Havbúnaðarfelagið savnar inn, og at sami prosentpartur av fiskinum er tikin til og við viku 37-2002, sum sama tíðarskeið í 2001.*
*Útflutningstølini 1987-2001 eru roknað burtur úr tilfari frá Hagstovu Føroya.*
*Útflutningsvekt er vekt av sløgdum fiski, flaki portiónum o.s.fr. íalt.*
*Vekt av sløgdum laksi verður roknað um til runda vekt við at falda við 1,111.*
*Sløgd síl verða faldað við 1,137 fyri at fáa vekt av rundum bløðgaðum fiski.*
*Sløgd og avhøvdaði síl verða faldað við 1,25 fyri at fáa vekt av rundum fiski. Hetta verður eisini nevnt Whole fish equivalent – stytt: WFE.*

*Talva 10. Smoltstøðirnar 01-10-2002*

| Navn | Loyvi | Alipláss |
|---|---|---|
| P/F Gulin | 1 | Svínoy |
| P/F Vestsmolt | 1 | Viðareiði |
| P/F East Salmon | 1 | Norðtoftir |
| P/F Faroe Smolt | 1 | Kalsoy |
| Norðoyar | 4 | 4 |
| P/F Gjáarsmolt | 1 | Gjógv |
| P/F Áarstøð | 1 | Funningur |

| | | |
|---|---|---|
| P/F Norðsmolt | 1 | Funningsfjørður |
| P/F Laksá | 1 | Hellurnar |
| Smoltstøðin Á Bakka | 1 | Glyvradalur |
| P/F Sýnin | 1 | Leirvík |
| Eysturoy E. | 6 | 6 |
| P/F Sandá | 1 | Selatræ |
| P/F Nólsoyar alistøð | 1 | Nólsoy |
| P/F Fiskaaling | 1 | Við Áir |
| Miðøkið | 3 | 3 |
| P/F Dalásmolt | 1 | Norðadalur |
| P/F Stiðjafjall | 1 | Norðadalur |
| P/F Fossáaling | 1 | Vestmanna |
| P/F Smoltaling | 1 | Vestmanna |
| Sp/F Røkt | 1 | Vestmanna |
| P/F Fútaklettur | 1 | Fútaklettur |
| Vestanfyri | 6 | 6 |
| P/F Guttanstøð | 1 | Fámjin |
| P/F Hovsá | 1 | Grønidalur |
| P/F Hovsá | - | Vatnsnesvatn |
| P/F Hovsá | 1 | Víkarbyrgi |
| Suðuroy | 3 | 4 |

***Alt landið    21 feløg    22 aliloyvi    23 alipláss***

-------------

- Onkur tøl eru rættað / dagførd í mun til áður útsend Alitíðindi -